## NORÐOYA APOTEK

### Hevur tú hug at gerast farmakonomur ?

Vit søkja eftir einum næmingi at byrja 1. mai 2007 ella eftir nærri avtalu.

Ert tú áhugaður/ur í apoteksarbeiði, kunnu vit bjóða eina spennandi og áhugaverda útbúgving.

Farmakonomútbúgvingin umfatar í stuttum at:

- Læra um heilsu, heilivág og viðgerð við heilivági, hvørji evni eru í heilivágstilbúningum og hvussu heilivágur virkar og skal handfarast.
- Læra at arbeiða sjálvstøðugt og taka avgerðir sambart galdandi lógum og reglum.
- Læra at geva viðskiftafólki okkara góða tænastu og leiðbeina i samband við útflýggjan av heilivági á apotekinum.

Útbúgvingin er ein 3 ára lærutíð, ið fer fram ávíkavist á apotekinum og á Farmakonomskúlanum í Hillerød.

**Krøv til umsøkjaran:**
Umframt Students-, HH-, HF-, HT- ella Fiskivinnuskúlaprógv, er tað av týdningi at tú hevur eitt opið sinni og hug at arbeiða við fólki.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum, møguligum viðmælum og arbeiðsroyndum, skal sendast til:
Norðoya Apotek
Fornagarðar
700 Klaksvík
áðrenn 16. apríl 2007.

Meira fæst at vita um útbúgvingina á
www.apotek.fo
ella við at ringja á Norðoya Apotek
tlf. 45 50 55 og spyrja eftir Kristbjørg.



## FRAMSÝNING 2007

Tórshavnar Kvøld– og Ungdómsskúli
Tórshavnar Listaskúli

hevur framsýning í

## KOLLAFIRÐI

Sunnudagin 25. mars kl. 15.00 - 19.00

Í Kollafjarðar skúla

**Eisini verður tónleikur og kórsangur**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Kl. 15.00 | Heðin Mortensen, borgarstjóri, setir framsýningina. | | |
| Kl. 15.15 | Kórið Sólarmagn | Lærari: | Fróði Sandoy |
| Kl. 16.15 | Hornbólkur | Lærari: | Ólavur Olsen |

Tórshavnar Kvøld– og Ungdómsskúli
Tórshavnar Listaskúli

KV2007

Maskinistur | Maskinmeistari | Skipari | Skipsførari

# Maskinistútbúgving

## fyri handverkarar við siglingarroyndum

**Byrjar 13. august 2007**

Hevur tú royndir sum maskinmaður, men ikki prógv, so er møguleikin nú at fáa prógv sum maskinistur við rætti til at fáa sjóvinnubræv sum maskinstjóri og 1. meistari á skipum, har framtøkumegin er upp til 2.999 kW.

**Útbúgvingin er ætlað teimum sum hava:**

- Innanfyri seinastu 5 árini siglt sum einsamallur meistari ella 1. meistari á skipum við framdrívsmegi á minst 750 kW.
- Góðkenda handverksútbúgving.

**Mannagongd:**
Umsøkjarin skal til samrøðu á Vinnuháskúlanum. Samrøðan snýr seg um gjøgnumgongd av tínum arbeiðsroyndum og vitan við tí endamáli at finna eitt grundarlag og góðkenning av tínum fakligu kvalifikatiónum fyri at fáa "merit" (Avriksflutningur).

Eftir samrøðuna verður ein útbúgvingarætlan gjørd, sum umsøkjarin skal fylgja.

Av tí, at henda útbúgving helst ikki verður ein afturvendandi møguleiki, er alneyðugt, at tú søkir um upptøku beinanvegin.

Umsóknirnar skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi tann 1. mai 2007.



KREA.FO · TEL 47 80 80

Vinnuháskúlin er ein nútímans skúli við serkønum lærarum í øllum lærugreinum, eins og skúlin hevur allar teir hentleikar og útbúnað, sum skulu til fyri at gera útbúgvingina áhugaverda og góða. Útbúgvingarnar á Vinnuháskúlanum eru góðkendar av Føroya Landsstýri, Søfartsstýrelsen og IMO.

**VINNUHÁSKÚLIN**
CENTRE OF MARITIME STUDIES & ENGINEERING

Postboks 104 · FO-110 Tórshavn · Tel 350 250 · Faks 350 251 · vh@vh.fo · www.vh.fo